## -Góðir brúktir frá REYNI SERVICE

**TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.** Skrás.: 30-04-98 Km.: 24.000 Prísur: 167.600,- Garanti**

**TOYOTA YARIS 1,0 TERRA** Skrás.: 07-05-99 Km.: 30.000 Prísur: 112.600,- Garanti**

**TOYOTA CARINA E 2,0 Gli AUT. GEAR** Skrás.: 13-06-96 Km.: 82.000 Prísur: 127.600,- Garanti*

**TOYOTA YARIS 1,0 TERRA** Skrás.: 21-04-99 Km.: 26.000 Prísur: 118.600,- Garanti**

**TOYOTA CARINA E 1,8 Gli** Skrás.: 28-06-95 Km.: 72.000 Prísur: 108.600,- Garanti* Sýnaður 12/99

**VOLVO 460 SEDAN** Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 6/99

**TOYOTA CARINA E 1,6 GXi** Skrás.: 11-09-95 Km.: 48.000 Prísur: 110.600,- Garanti*

**HONDA CIVIC 1,4** Skrás.: 07-04-97 Km.: 52.000 Prísur: 110.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA** Sýnaður 5/00 Skrás.: 12-04-96 Km.: 105.000 Prísur: 105.600,- Garanti*

**MAZDA 323 DIESEL** Skrás.: 04-07-97 Km.: 90.000 Prísur: 114.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA E 2,0 GLi SEDAN** Skrás.: 17-08-92 Km.: 95.000 Prísur: 85.600,- Garanti*

**FORD ESCORT 1,8 T-DIESEL STW.** Skrás.: 08-10-97 Km.: 24.000 Prísur: 118.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA 2.0 Gli** Sýnaður 3/00 Skrás.: 02-07-90 Km.: 170.000 Prísur: 65.600,-

**OPEL CORSA 1,4 SWING 5 HURÐ.** Skrás.: 19-06-96 Km.: 61.000 Prísur: 83.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA 2,0 Gli L/B** Skrás.: 14-08-91 Km.: 69.000 Prísur: 72.600,- Garanti* Sýnaður 5/99

**OPEL ASTRA 1,8 STATION** Skrás.: 09-11-95 Km.: 71.000 Prísur: 79.600,- Garanti*

**TOYOTA CARINA 2,0 XIi** Skrás.: 19-10-90 Km.: 122.000 Prísur: 57.600,-

**FORD ESCORT 1,8** Skrás.: 21-08-95 Km.: 81.000 Prísur: 65.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur: 128.600,- Garanti**

**FORD MONDEO 2,0 AIR-CON** Skrás.: 02-07-96 Km.: 52.000 Prísur: 120.600,- Garanti*

**TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA** Skrás.: 16-03-98 Km.: 50.000 Prísur: 112.600,- Garanti**

**PEUGEOT 106 DIESEL** Skrás.: 15-05-96 Km.: 60.000 Prísur: 63.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA** Skrás.: 01-05-95 Km.: 139.000 Prísur: 87.600,- Garanti* Sýnaður 12/99

**KIA SEPHIA 1,5** Skrás.: 17-04-97 Km.: 59.000 Prísur: 62.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA** Skrás.: 20-09-95 Km.: 72.000 Prísur: 85.600,- Garanti* Sýnaður 6/99

**KIA SEPHIA 1,5** Skrás.: 14-03-97 Km.: 107.000 Prísur: 58.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 STW.** Skrás.: 01-06-92 Km.: 82.000 Prísur: 62.600,- Sýnaður 8/00

**VOLVO 240 GL AUT.** Skrás.: 04-06-86 Km.: 165.000 Prísur: 22.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,3 STATION** Skrás.: 13-04-92 Km.: 110.000 Prísur: 57.600,- Sýnaður 2/99

### VØRUVOGNAR

**TOYOTA LANDCRUISER 4,0 TURBO** Skrás.: 20-10-88 Km.: 159.000 Prísur: 99.600,- Sýnaður 8/00

**TOYOTA DYNA 150 V/LAST** Skrás.: 24-02-97 Km.: 100.000 Prísur: 90.600,-

**TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL** Skrás.: 05-11-86 Km.: 230.000 Prísur: 48.600,-

**NISSAN PATROL 4x4** Skrás.: 01-07-89 Km.: 197.000 Prísur: 55.600,- Sýnaður 12/98

**FORD COURIER DIESEL** Skrás.: 22-05-94 Km.: 91.000 Prísur: 48.600,-

**VW TARO 4x4 PICK-UP** Skrás.: 05-11-91 Km.: 175.000 Prísur: 72.600,-

**VW LT 35 VAN** Skrás.: 30-06-93 Prísur: 39.600,-

### AVHEINTINGAR-TILBOÐ

**TOYOTA CARINA 1,6 XL SEDAN** Skrás.: 19-10-87 Km.: 175.000 Prísur: 7.600,- Sýnaður 10/98

**FORD SIERRA 1,6** Skrás.: 10-05-89 Km.: 110.000 Prísur: 12.600,- Sýnaður 5/00

**HONDA ACCORD** Skrás.: 09-04-87 Km.: 179.000 Prísur: 14.600,- Sýnaður 5/98

**NISSAN BLUEBIRD** Skrás.: 12-06-87 Km.: 157.000 Prísur: 17.600,-

**FORD ESCORT** Skrás.: 14-03-88 Km.: 177.000 Prísur: 9.600,- Sýnaður 3/99

**TOYOTA CAMRY 1,8** Skrás.: 30-06-88 Km.: 140.000 Prísur: 15.600,- Sýnaður 4/99

**OPEL ASCONA 1,6** Skrás.: 01-01-87 Prísur: 3.600,-

**TOYOTA CARINA 1,6 DS** Sýnaður 5/00 Skrás.: 09-06-87 Km.: 221.000 Prísur: 15.600,-

**Støkk inn á gólvið!**

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE

Opi : M n.-fr . 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820


# Fróðskaparsetrið illa spert

*Nú eru studentarnir á Setrinum farnir aftur á skúlabonk, men umstøðurnar eru alt annað enn góðar, tí húsast verður í seks ymiskum bygningum*

Stefan í Skorini

Fróðskaparsetrið hevur sett met við nýggjum studentum. 82 nýggj andlit verða at síggja á Setrinum í ár. Av teimum tilsamans 130 studentunum eru 82, sum byrja lesturin á fyrsta ári. Hetta er væl meira enn helvtin av øllum studentunum.

Orsøkin til ta stóru tilgongdina er, at allar tríggjar deildirnar hava tikið nýggjar studentar inn, og tær hava eisini tikið nógvar nýggjar sammett við onnur ár.

Á Náttúruvísindadeildini eru 20 nýggir studentar í støðisútbúgving í stødd- og alisfrøði. Á Føroyamálsdeildini eru 25 tikin inn til exam. art. í norðurlendskum og serliga føroyskum máli og bókmentum. Á søgu- og samfelagsdeildini eru 37 nýggir studentar tiknir inn til ársnám í samfelagsfrøði. Ársnámini eru fleiri í tali, og tey kunnu setast saman til BA.

Tey samfelagsfrøðiligu námini eru tey einastu nýggju skeiðini á Fróðskaparsetrinum.

### Einki pláss

Tað er óivað gleðiligt, at alt fleiri velja at fáa sær víðari útbúgving her heima, men umstøðurnar hjá teimum lesandi í Føroyum eru sera vánaligar.

Í løtuni eru ikki færri enn seks ymiskir bygningar, sum Fróðskaparsetrið nýtir. Nakrar deildir eru í teirra egnu húsum í Nóatúni og í seturshúsunum á Debesartrøð. Søgu- og samfelagsdeildin er í J.C. Svabosgøtu. Harumframt er undirvísing í Brúna skúla hjá Venjingarskúlanum og úti á Sjómansskúlanum. Umsitingin húsast á setursskrivstovuni, sum liggur handan Á.

Her eru tilsamans seks ymiskar adressur, sum studentarnir mugu renna ímillum, og tað fer ikki at bera til í longdini.

Malan Marnersdóttir er rektari á Fróðskaparsetri Føroya, og hon sigur, at hetta er alt plássið, sum tey hava fingið. Hon leggur afturat, at plásstrot og hølistrupulleikar er ein vanligur trupulleiki hjá fleiri almennum lærustovnum. Fróðskaparsetrið er sostatt ikki eindømi.

Spurd um tað ikki er løgið at taka so nógvar nýggjar studentar inn, tá umstøðurnar eru so vánaligar, svarar Malan Marnersdóttir, at tey hava tikið inn eftir tí, tey fingu lovað áðrenn summarfrítíðina. Hon ásannar samstundis, at umstøðurnar eru als ikki nóg góðar.

Hon sigur eisini, at hølini á Sjómansskúlanum fingu tey lyfti um einaferð í vár.

Enn er eingin varandi loysn funnin á hølistrupulleikunum á einum av okkara hægstu lærustovnum, og ógreitt er, hvussu støðan verður næsta ár.

- Nú fáa vit at síggja, tí hetta eru bara fyribils avtalur, ið vit hava gjørt. Einki varandi er komið uppá pláss, og tí mugu vit hava fund við Undirvísingar- og og mentamálastýrið og saman finna eina loysn á málinum, sigur Malan Marnersdóttir.

Hon sigur seg sjálvandi vænta, at okkurt munagott kemur burturúr.

Rektarin á Fróðskaparsetrinum er enn ikki greiður yvir, um talan verður um at fara undir at byggja nýggjan bygning til Fróðskaparsetrið, og hon skuldi verið tann fyrsta at fingið nakað at vita tí viðvíkjandi .

### Neyðugt við lestrarumhvørvi

Tað er avgjørt tørvur á betri umstøðum fyri studentarnar á Setrinum, tí støðan í dag er ótolandi við so nógvum ymiskum bygningum.

- Tað er sjálvandi best, um Fróðskaparsetrið verður savnað undir eina lon, so studentar kunnu uppliva eitt veruligt lestrar- og granskingarumhvørvi, tí tað er ein týðandi partur av lestrinum, sigur Malan Marnersdóttir.

- Studentarnir hava heilt einfalt ov vánalig viðurskifti. Tað eru nøkur spjadd undirvísingarhøli og einki annað, leggur Malan afturat.

Studentarnir hava sostatt ikki serliga góðar møguleikar at koma saman uttanfyri skúlastovuna, og tað eigur tað at verða møguleiki fyri.

### Nýggjar lærugreinar

Hóast teir núverandi álvarsomu trupulleikarnar hava tey gott mót á Fróðskaparsetrinum, tí í næstum verður farið undir eina nýggja útbúgving.

Ætlanin er, at geva føroyingum møguleika at fáa eina KT útbúgving á Setrinum. Í vár varð tosað um at byrja eitt KT nám, og tær ætlanirnar eru ikki sleptar enn.

Talan er um framhald av støðisútbúgving í KT-frøði, og tað verður ein opin útbúgving, har studentarnir bara eru hálva tíð. Teir taka so eina hálvtannað ára útbúgving yvir trý ár.

Ætlanin var at fáa tað í gongd í ár, men tað hevur ikki ligið fyri.



*Vegna plásstrot mugu studentar av Fróðskaparsetrinum hava undirvísing á Sjómansskúlanum*

Mynd: Jens Kr. Vang



# Kommunalt arbeiðsgevarafelag á veg

*Formaðurin í Føroya Kommunufelag arbeiðir í løtuni við at gera eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag. Fyrst í næsta mánaði verður felagið stovnað*



*Jógvan K. Mørkøre, formaður í Føroya Kommunufelag*

Jógvan K. Mørkøre, formaður í Føroya Kommunufelag, sigur við Sosialin, at endamálið við nýggja arbeiðsgevarafelagnum er, at samskipa kommunalu lønarsamráðingarnar.

- Sum støðan er í løtuni, so kunnu fakfeløg ferðast frá kommunu til kommunu og gera sáttmálar, og tá er vandi fyri, at munur verður á teimum ymsu sáttmálunum. Hesum fyribyrgja vit við at gera eitt felag, sum samráðist við fakfeløgini, sigur Jógvan K. Mørkøre.

Hann heldur ikki at tað er nakað løgið í, at gera eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag. - Tað er púra vanligt at privat feløg taka seg saman í arbeiðsgevarafeløg, og tað er eisini púra vanligt, at starvsfólk taka seg saman í fakfeløg. Vit kunnu ikki vera limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, so tí stovna vit okkara egna felag, sigur Jógvan.

Hóast tað er Føroya Kommunufelag, sum stendur, sum stovnari av felagnum, so er ikki óhugsandi, at allar kommunur í Føroyum gerast limir í felagnum. Stóru kommunurnar hava sítt egna felag — Kommunusamskipan Føroya — men tað er ikki óhugsandi at limirnir í tí felagnum eisini fara upp í nýggja felagið. Tað heldur Jógvan við Keldu í hvussu er.

- Hóast hetta er rættuliga nýtt fyri meg, so dugi eg væl at síggja nakrar fyrimunir í einum kommunalum arbeiðsgevarafelag, sigur Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík.



*Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík*

Hansara meting er, at tað sjálvandi er lættari at hava eina felags samráðing, heldur enn 50 — ella har á leið — og tí er hetta ein áhugaverdur tanki, eisini fyri Kommunusamskipan Føroya. Hann leggur tó dent á, at málið ikki er viðgjørt í samskipanini.

Hjá Starvsmannafelagnum verður tað bara staðfest, at kommunurnar arbeiða við ætlanini. Gunnleivur Dalsgarð sigur, at tað eru kommunurnar vælkomnar til, men at hetta ikki broytir framferðarháttin hjá hansara felag.



*Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

- Starvsmannafelagið er í ferð við at gera sáttmálar við allar kommunur. Vit hava gjørt nakrar og samráðast í løtuni við aðrar. Hesum fara vit at halda fram við, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Hóast hann tí ikki er so bangin fyri tí nýggja arbeiðsgevarafelagnum, so vónar hann, at ætlanirnar eru meira »seriøsar« enn tær vóru mitt í áttatiárunum. — Verður tað uppskotið, sum Kommunufelagið tá hevði gjørt, grundarlagið, so er einki at tosað um. Ta ferðina høvdu teir gjørt eitt uppskot, sum var púra burtur úr vón og viti. Men lat okkum nú fáa at síggja, sigur Gunnleivur Dalsgarð.




## NÝTT HÁR!

Nú koma vit aftur á vitjan í Føroyum. Við okkum hava vit snotuligasta úrvalið av hárkollum og parúkkum.
Vit hava einaumboðan av nýggjari japanskari tægr, sum er einastandandi slitsterk, og tískil serstakliga vælegnað til fólk við kropsliga hørðum arbeiði - til dømis fiskimenn, handverkarar og onnur.
Hárluturin hevur ótrúlig evni at halda hársniði, og verður ikki sleipin sum frálíður. Harumframt er hann sera vælegnaður til varandi áseting.
Og júst varandi áseting er serøki okkara. Lagdur verður ein tráður undir húðina, og síðan verður hárluturin fastgjørdur.
Nú vaskar og greiður tú hárið, sum var tað títt egna. Ein lættur og fittligur máti at endurnýggjað hárið. Sjálvur avger tú alt um lit, snið, bygnað o.s.fr.
Legg til merkis:
Vit eru fremstu útvegarar og serfrøðingar Danmarkar tá umræður øðrvísi hár, so kom innar og hygg at tilfarinum...

**HOTEL HAFNIA** (Loftið)
Leygard. 16. sept. og sunnud. 17, sept.
frá kl.14.00 - 19.00

**SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK**
Mánad. 18. sept.
kl.12.00 - 18.00

Vinarliga ring og bílegg tíð

Henning Toftild
Alternativt Hår Aps
Budolfi Plads 9 DK-9000 Aalborg
tlf: 98 103211 fax: 98 133622
e-mail: alternativt-haar@alternativt-haar.dk
web: www.alternativt-haar.dk



Vikuskifti í
## ABERDEEN

Vikuskiftis tilboð galdandi hósdag - mánadag




**Skene House Rosemont**
Prísir pr. persón um 6 fólk búgva saman — kr. **2.310,-**

**Thistle Altens*****
Prísur pr. persón í dupultkamari — kr. **2.710,-**

**Copthorne Hotel******
Prísur pr. persón í dupultkamari — kr. **2.950,-**

**Vikuskiftistilboð frá Europcar**
Frá fríggjamorgun - mánamorgun prísir úr kr. **1.044,-**

**Nøkur tiltøk í Aberdeen í heyst**

| | |
|---|---|
| 16 sept | Bob Dylan konsert |
| 23 sept | Country Fair |
| 23 sept | U2 konsert |
| 24 sept | Magic / Freddy Mercury Show |
| 12 okt | Status Quo konsert |
| 27 okt | Abbamania |

**Fótbóltur í heyst**
Heimadystir hjá Aberdeen

| | |
|---|---|
| 09 sept | St. Johnstone |
| 30 sept | Celtic |
| 14 okt | Dundee |
| 21 okt | Dunfermline |

Atlantic Airways
TEL 333 900 · FAX 333 380